# GÓÐA GAMLA KJAKIÐ ER BURTUR

**Tá bløðini góvust við dulnevndum lesarabrøvnum, stegðaði góða, gamla kjakið. Tað heldur Ólavur í Beiti, sum rekur Vágaportalin. Hann loyvir fleiri dulnevndum at siga sína hugsan á sínari heimasíðu. Øssur Winthereig, fyrrverandi journalistur, heldur, at tað eru fyrimunir við summum dulnevndum lesarabrøvum og keldum**

Uni Holm Johannesen

Dulnevnd lesarabrøv fáa ikki longur teigapláss í føroysku bløðunum.

Tað ber ikki longur til at sleingja um seg við orðum og atfinningunum, uttan tú setir navn undir og stendur við ábyrgdini.

Vágaportalurin er millum mest vitjaðu føroysku tíðindasíðurnar.

Ólavur í Beiti, sum rekur heimasíðuna, loyvir fleiri dulnevndum lesarabrøvum framat.

Hann heldur, at síðan bløðini vrakaðu dulnevndu lesarabrøvini, er góða, gamla kjakið, sum hann tekur til, horvið.

– Dulnevndu lesarabrøvini ávirka almenna kjakið í størri mun. Fleiri koma við sínum meiningum. Í Føroyum vilja vit so fegin vita, hvør skrivar. Vit vilja síggja nøvn, og innihaldið er ikki so umráðandi. Vit gloyma, at tað, sum verður skrivað, er tað týdningarmesta, sigur Ólavur í Beiti.

Øssur Winthereig er útbúgvin journalistur. Hann var tíðindaleiðari í sjónvarpinum í 10 ár. Saman við Grækarisi Djurhuus Magnussen gav hann út bókina 'Skjót Journalistin' í 2003.

Øssur Winthereig heldur, at tað kunnu vera fyrimunir við ávísum dulnevndum lesarabrøvum, tí starvsheiti ella persónligar orsøkir kunnu forða fyri, at fólk seta navn undir, og tískil ikki loysa frá posabandinum.



*Ólavur í Beiti*



*Øssur Winthereig*

Tað er innihaldið og tíðindavirðið, sum er mest umráðandi.

– Føroyskir miðlar brúka ofta dulnevndar keldur. Hvør er munurin á dulnevndum lesarabrøvum og dulnevndum keldum? Um ein álítandi kelda greiðir dulnevnt frá, hvat veruliga er hent við miðnámsskúlanum í Hovi, so skal tað sjálvsagt vera pláss fyri tí. Tað hevði verið eitt stig rætta vegin, sigur Øssur Winthereig, sum tó er fegin um, at óneyðug dulnevnd lesarabrøv ikki fáa innivist í bløðunum longur.

## Blaðstjórin taka støðu

Tað eru út við 14 ár síðan, at Sosialurin gavst at prenta dulnevnd lesarabrøv. Dimmalætting valdi sama leist fyri trimum árum síðan.

Hesi lesarabrøvini, sum oftast var gott tilfar, fingu pláss í bløðunum við teirri grundgeving, at føroysku viðurskiftini eru so smá, og fólk hildu seg aftur, um navnið skuldi standa undir.

Bløðini prentaðu hinvegin ongantíð allar viðmerkingarnar. Vóru tær ov grovar, sluppu tær ikki í blaðið.

Men ofta vórðu dulnevnd lesarabrøv prentað, sum vóru beinleiðis vend móti øðrum persónum.

Øssur Winthereig vísir á kjak.org sum dømi um kjak á sera lágum støði, har allarflestu kjakararnir krógva seg undir dulnevni og spilla onnur út.

Dulnevndar, ærumeiðandi og útspillandi viðmerkingar skulu í ruskkurvuna, heldur Øssur Winthereig.

Men er tað ein dulnevnd kelda, sum vil siga okkurt, sum er stimbrandi fyri samfelagskjakið, og livir tær upp til treytirnar, so skal pláss vera fyri teimum, sigur hann.

– Um lesarabrøv og keldur skulu vera dulnevnd, skulu tey hava journalistiska viðgerð. Blaðstjórin, sum stendur við evstu ábyrgdini, skal spyrja seg sjálvan, hvat viðkomandi vil við lesarabrævinum, er keldan álítandi, og er tað journalistiskt rætt at varpa viðmerkingina út dulnevnda. Í summum førum er tað gott, tí summi kunnu ikki seta navn undir, uttan at tey brenna seg illa, heldur Øssur Winthereig.

Hann sigur, at blaðstjórin veit oftast, hvør avsendarin er, og tí kann blaðstjórin gera av, um avsendarin er álítandi ella ikki.

Ólavur í Beiti leggur dent á, at allar viðmerkingar, sum verða sendar Vágaportalinum, verða endavendar.

Hann metir um tíðindavirðið, og tekur síðani støðu til, um tað er vert at leggja út á netið

– Eg havi ongantíð sagt, at dulnevnd kunnu leggja eftir øðrum og siga søgur um onnur, uttan at navn verður sett undir. Als ikki. Vágaportalurin loyvir ikki øllum út, sigur Ólavur í Beiti.

Sosialurin og Dimmalætting vildu hækka støðið við, at navn skuldi setast undir. Soleiðis fingu vit eitt meira opið og erligt kjak, varð mett. Tað varð ført fram, at fólk, sum ikki vildu nevnast við navni, kundu seta seg í samband við journalistarnar á bløðunum at skriva fyri seg.

Tað hevur víst seg at verið lættari sagt enn gjørt.

## Løgtingsmaður fullur

Vágaportalurin og Portalurin skrivaðu mikudagin um Hans Paula Strøm, sum var drukkin undir framførslu í Vestmanna.

Keldan til søguna var dulnevnd.

Ólavur í Beiti sigur, at tað er øðrvísi, tá løgtingsfólk standa fyri skotum.

– Ein politikari er í serstøðu. Tað er ein almennur persónur við almennari ábyrgd, so at siga, og politikarin skal standa til svars alment, sigur Ólavur í Beiti.

Øssur Winthereig vísir á, at søgan um Hans Paula Strøm hevði helst fingið innivist í bløðunum sum dulnevnt lesarabræv fyri nøkrum árum síðan.

Portalurin valdi at brúka dulnevndu kelduna og spurdi tingmannin fyri Javnaðarflokkin um tilburðin.

Søgan fór gjøgnum journalistisku mylluna, og tað var mett, at tíðindavirði var í søguni.

– So kann hvør einstakur gera av, um tað var rætt ella skeivt, sigur Øssur Winthereig.

